miðvikan

Nr. 143 • 30. juli 2008

Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

### Í grannalagnum hjá Tróndi í Gøtu:

# Vanlukkur á sjónum og Óla Jákup á Bakkanum

**Hildið verður fram við frásøgnum frá grannlagnum hjá Tróndi í Gøtu. Her hava verið vanlukkur á sjónum, sum hava rakt bygdina meint. Ein áhugaverdur persónur í grannalagnum var eisini Óla Jákup á Bakkanum og hansara ætt**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**5. partur**

**Lagnudagurin í 1913**

**Í seinasta parti høvdu vit fyrra part av frásøgnini hjá Petur Jakku í Blásastovu, pápi Tórir Thomsen, um hansara fyrsta túr til útróðrar. Í hesum seinna partinum var hann til útróðrar feigdardagin 23. desember 1913:**





*Hendan frálíka tekningin av Gøtu kirkju er frá aldarskiftinum, teknað av Christian Heilskov, blaðstjóra á Dimmalætting. Petur Jacob gav seinni eina ljósakrúnu til kirkjuna sum tøkk fyri, at sonurin Jákup varð bjargaður, tá ið skip hansara gekk burtur*

Vit vóru eisini til útróðrar tann ringa dagin, tollaksmessudag í 1913. Vit róðu suðureftir hendan dagin. Vit egndu um náttina. Tað vóru vánalig líkindir. Barometrið fall skjótt. Tað vóru eisini so grúiligir regnstoytingar. Summir bátar egndu, og aðrir egndu ikki orsakað av líkindunum. Eg var 24 ára gamal, og tað var eg sum dreiv bátin. Vit róðu út eftir móti Mjóvanesi út á Svínoyarfjørð. So fóru vit at seta. Tað var lagaligt, so vit settu tað mesta av línuni. Tá tvær línur vóru eftir, vóru sovorðin køst niður á sjógvin. Tað vóru slíkir stoytingar av regni. Høvdu vit verið eldri, høvdu vit neyvan sett alt. Alt varð tískil sett. Línan stóð nú ikki so leingi. So fóru vit at draga. Hetta gekk bedrøviliga illa at byrja við. Suðurrákið var so mikið hart, og vindurin var so nógvur av landnyrðingi, at vit orkaðu ikki at rógva framyvir línuna. Vit stríddust við hetta tann heila og haldna dagin. Eg minnist, at eg var frammi í skut seinnapartin av dragingini. Tað var nógvur vindur, men tá var suðurrákið burturdottið, so tá gekk væl at draga. Tá bar til at andøva so frægt, at tað kundi komast fram á línuna. So var liðugt at draga, og fisk høvd vit nógv av. Tað var mest sum ov nógv í bátinum. Mann tosaði um bekkfastan bát. Tá var bakskuturin fullur og tað sama var við rúmini har frammi, bógrúmið og tofturúmið. Tá ið línan var komin inn mátti seglið repast. Eg minnist, at eg stóð frammi í skut. Tað var so nógvur vindur, at hann datt til annan kjálkan, og teir fingu hann ikki upp ímóti aftur. Tá so seglið var repað, og blokkurin var niðurflyttur á mastrini, tá varð seglið ákoyrt. Tað var ræðuligt, sum hann sigldi skjótt inn eftir. Tað var so nógvur vindur, at tað gekk eisini nógvur sjógvur á bátin, men seglið bleiv standandi. Tá vit komu inn fyri Lambavík var ljós tendrað i Lamba. Tað var ein gamal maður á bátinum. Hann æt Ísakur. So sigi eg við hann: "Hvat halda tygum Ísakur? Skulu vit fara heim til Lamba ella skulu vit royna Mjóvanes, so vit sleppa inn á Gøtuvík." Hann helt spakuliga fyri, at tað var betri at fara til Lamba. Men eg var ungur og hevði tó hug at prøva at fara á Gøtu, tí at eystfallið var við okkum. So bleiv gjørt. Vit fóru so eysturum. Vit vóru teir flestu ungir menn. Vit vóru tríggir sum vóru 24 ár, tað vóru tveir sum vóru yngri, og so var tað Ísakur, sum var eldri. Tað gekk bara væl heim við landinum. So róðu vit allan vegin heim við Mjóvaneslandinum, heim fyri Syðrugøtu. Hann var landnyrðingur í ættini. Tá vit



*Soleiðis fóru gøtumenn til handils til Klaksvíkar um ta tíðina, tá ið teir fóru at keypa timbur til kirkjuna. Menninir eru frá vinstru: Magnus á Mýruni, Petur Jakku hjá Nellu,var við Waagen, Gamli Heini, Ólavur inni í Oyri, Elias í Bartalstovu, allir úr Syðrugøtu og Sámal Jákup í Frammistovu í Norðragøtu*